

*Tað var ikki bara sum at siga tað, tá Sólrun skuldi siga Løkke frá, at hon var við barn*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# Soleiðis hittust Sólrun og Løkke

EIN **SAMTALA** MILLUM NORÐURKOREA OG FØROYAR FEKK HEILT SERLIGAN **TÝDNING** FYRI TEY



**LØKKE OG SÓLRUN**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Farna vikuskiftið vitjaðu danski forsætisráðharrin og føroyska kona hansara í Føroyum. Tey vóru við í sendingini Hvonn Live hjá Rás2, og har greiddu tey millum annað frá, hvussu tey hittust av fyrstan tíð.

Sólrun var farin til Danmarkar at lesa, og fyrstu ferð tey hittust var á einum lestrarbústaði í Keypmannahavn.

– Sólrun búði við síðuna av einum, sum eitur Kaj, og hann kendi eg frá politiska arbeiðnum. Eitt kvøldið var eg á kolleginum, og tá hitti eg Sólrun fyrstu ferð. So gekk eitt sindur av tíð. Eg bankaði av og á upp á hurðina hjá henni, og at enda lat honum upp, greiddi Løkke skemtandi frá.

– Og tá eg fyrst var farin inn, kom eg ikki útaftur, legði hann afturat.

Lars Løkke Rasmussen var ta tíðina formaður í ungdómsfelagnum hjá Vinstra flokkinum, og hann ferðaðist nógv kring Danmark. Og tá hann kom aftur til Keypmannahavnar gekk leiðin oftast at vitja Sólrun heldur enn at fara heim.

## Telefon úr Norðurkorea

Í 1989 fór Lars Løkke Rasmussen til Norðurkorea á eina altjóða ungdómsráðstevnu, og beint áðrenn fráferð segði Sólrun við hann, at hon helt seg verða við barn.

Løkke fleyg til Norðurkorea, og Sólrun fór heim til Føroya, har hon ætlaði at fáa staðfest, um hon var upp á vegin.

– Vit avtalaðu, at eg skuldi ringja nakrar dagar seinni fyri at vita, hvussu støðan var. Men tað var ikki bara sum at siga tað, at fáa samband til Føroya. Tað kann væl verða, at nógv kenna Føroyar, men í Norðurkorea hevði eingin hoyrt um Føroyar áður, sigur Løkke.

– Men at enda eydnaðist tað mær at fáa samband við Føroyar á einum miðlasentri, men tað var ein samtala, sum bara kundi varða ein minutt. So Sólrun fekk júst sagt, at hon var við barn, og so breyt tað av. Men nakrar dagar seinni fóru vit heimaftur, og so fleyg eg beinleiðis til Føroya.

Síðani hava Sólrun og Løkke fingið trý børn – Bergur, Lisa og Símun.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: **EIN NÝGGJ EIVØR**
6 TIPS: **TASKUR**
8 SAMRØÐA: **ALEXANDUR KRISTIANSEN SKORAR Á FØROYSKUM**
11 90 SEKUND: **JENSINA OLSEN**
12 GREINARØÐ: **KALDA KRÍGGI**
14 HEILSUSÍÐAN: **MINKA UM SUKRIÐ Í MATINUM**
16 TIL ARBEIÐIS: **JÓHANNA HENRIKSEN**
17 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **RÆSTUR FISKUR Í FATI**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

**KLUMMAN**



*Eirikur Lindenskov*

# Ignoransa úr ovastu skuffu

Og píkarill sum eg haldi, at kappingarneytar okkara viðhvørt eru primitivir!

Seinasta leygardag høvdu vit í Miðlahúsinum forkunnuga vitjan. Forsætisráðharri Danmarkar og konan vóru komin til Føroya at vitja Rás2. Ella rættari umvent, tað var føroyska kona forsætisráðharrans, Sólrun, sum var komin at vitja okkum, og við sær hevði hon mannin. Líkamikið. Tey vóru her.

Tað er ikki hvønndagskostur, at ein forsætisráðharri vitjar í Føroyum. Og hetta er fyrstu ferð, at ein forsætisráðharri er komin til Føroyar at vitja ein fjølmiðil. Vit fingu sum væntað fult hús á Hvonn, tá sendingin »Hvonn Live« var í luftini. Men tað sum undraði okkum var, at eingin av okkara kappingarneytum vitjaði – og tíðans heldur umrøddi vitjanina hjá Sólrun og Lars Løkke Rasmussen.

Tað haldi eg vera ótrúliga løgið. Her vóru øll tíðindakriterii sett til viks, tí »nei, hundanstíð: Rás2 og Sosialurin skulu yvirhøvur onga umtalu hava, tí tey gera seg upp og bjóða forsætirsráðharranum til Føroyar«.

Ikki tí, vit høvdu tað so deiliga friðarligt við at hava forsætisráðharran og konuna fyri okkum sjálvi – og vit sluppu einsamøll at seta dagsskránna. Lars Løkke Rasmussen varð spurdur á føroyskum, hann skilir væl føroyskt, hóast hann ikki tosar tað eins væl – í øllum førum alment. Men hann skrivaði eina heilsan í gestabókina á føroyskum.

Hugsaði um hetta týsdagin, tá allir miðlar í Danmark refereraðu til eina hólmgongu millum Lars Løkke Rasmussen og Helle Thorning Smidt, sum Politiken skipaði fyri. Jú, danskir miðlar ganga í størri skóm enn okkara heimligu.

So nógv høvdu Dia og Sigmar heldur ikki um oyrini í útvarpinum um vikuskiftið, at teir ikki kundu fingið orðið á forsætisráðharran ella lisið um tað á portalinum – ella man hetta verða »vi alene vide«-linjan hjá nýggju tíðindaleiðsluni í Kringvarpinum?

Tað undrar okkum, at allir okkara kappingarneytar eru so eiðasørir, at tey ikki so frægt sum umrøddu vitjanina og tiltakið hjá Rás2.

Tað er ignoransa av ovastu skuffu.




VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Eivør Pálsdóttir / Rólant Waag Dam